# Fyribyrgingarráðið

Postboks 135. 110-Tórshavn
Heiliráðdeildin
Landssjúkrahúsið
att. Heðin Thomsen
Tlf.: 313540 lokal 236 ella lokal 229
Fax.: 312745 T-postur: heto@ahs.fo

**Skrivari til Fyribyrgingarráðið:**
Søkt verður eftir einum fólki at starvast 1/2 tíð hjá Fyribyrgingarráðunum frá 15. januar 2002 ella eftir nærri avtalu.
Um størri tørvur verður fyri arbeiðsorku seinni, verður møguleiki at økja tíðina til 3/4 ella fulla tíð.

**Um starvið:**
Tann, sum verður settur, skal starvast á skrivstovu ráðsins og hava dagliga raksturin av skrivstovuni um hendi.
Hann/hon verður skrivari hjá ráðnum, skal røkja samskiftið millum ráðið og aðrar stovnar bæði innan- og uttanlands; skal saman við ráðnum leggja til rættis og útinna verkætlanir á fyribyrgingarøkinum.
Skrivstovan skal m.a. fáa til vega og greina (tilreiða) hagtøl til tess at lýsa støðuna á fyribyrgingarøkinum.

Umframt at luttaka aktivt á einum ella fleiri serøkjum innan fyribyrging, skal viðkomandi røkja dagliga samskiftið við teir ráðgevar, sum verða settir at loysa serligar uppgávur.

**Vit sóknast eftir fólki, sum uppfyllir hesi krøv í so stóran mun sum gjørligt:**
Tú skalt hava áhuga og ágrýtni at arbeiða við fyribyrging á einum breiðum grundarlagi.
Um tú hevur eina hægri útbúgving innan samfelagsviðurskifti/heilsuviðurskifti, verður tað roknað sum ein fyrimunur.
Royndir innan fyribyrgingararbeiði ella praktiskar royndir við verkætlanum á heilsu/fyribyrgingar-økinum verða eisini roknaðar sum ein kvalifiserandi førleiki.
Førleiki í at nýta teldu til vanligar skrivstovuuppgávur íroknað T-post samskifti er eisini ein fyrimunur.

**Um okkum:**
Fyribyrgingarráðið er eitt ráð við 7 limum, sett sambært løgtingslóg. Limirnir eru fakfólk innan økir við tilknýti til heilsu- og ella fyribyrging.
Ráðið virkar undir landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum og hevur sambært lógina m.a. til uppgávu at ráðgeva lands- og kommunalum myndugleikum um fyribyrging, at styrkja heilsufremjandi og fyribyrgjandi tiltøk, at taka stig til kanningar og útgreiningar á økinum og at stimbra gransking og royndum á økinum.

**Lønar- og setanartreytir:** sambært sáttmála millum viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin Thomsen, formann í fyribyrgingarráðnum, tlf. 313540 lok 236, heto@ahs.fo ella til Mariu á Dul, deildarstjóra, Almanna- og heilsumálastýrið, tlf. 304050, mad@ahs.fo
Lógin um Fyribyrgingaráð og viðmerkingar kunnu heintast á heimasíðu Føroya Løgtings. http://www.logting.fo/

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum skal sendast til:

**Almanna -og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 2. januar 2001 kl. 12.00

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Fíggjarleiðari

Í samband við bygnaðarbroytingar á Almanna- og heilsumálastýrinum verður fíggjardeild aftur sett á stovn sum ein partur av fyrisitingini á Landssjúkrahúsinum. Tí verður søkt eftir deildarleiðara til Fíggjardeildina á Landssjúkrahúsinum til setan 1. mars 2002 ella skjótast gjørligt.

Fyrsta uppgávan verður at fáa skipað deildina at virka sum ein partur av fyrisitingini á Landssjúkrahúsinum.

**Arbeiðsuppgávur:**
- leiðsla av deildini
- ábyrgd fyri at gera roknskap og fíggjarætlan, uppfylgja og hava eftirlit við rakstrinum í mun til fíggjarætlanina
- hjálpa depilsleiðslunum á fíggjarliga økinum
- bindilið millum sjúkrahúsleiðsluna og depilsleiðsluna/deildarleiðslurnar á fíggjarliga økinum
- ábyrgdina fyri bókhaldsøkinum
- gera mannagongdir á roknskaparøkinum
- skipa leiðslukunningina
- skipa hagtøl

**Førleikakrøv:**
- prógv í HD-roknskapi ella cand merc
- leiðsluroyndir
- førleiki at ætlanargera og raðfesta sítt arbeiði
- støðugt at kunna dagføra sína vitan innan roknskaparlógir og reglur
- holla vitan um lógir og reglugerðir
- góð samstarvsevni
- tænastusinnað/ur
- góður røkjuskapur
- góður førleiki innan it/edv

**Bygnaður:**
Næsti fyrisetti hjá starvsetta verður Sjúkrahúsleiðslan á Landssjúkrahúsinum. Viðkomandi skal tola møguligar broytingar innan starvsinnihald og bygnað.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Jóanis Erik Køtlum, sjúkrahúsleiðara, telefon 31 35 40, lokal 251 ella á e-post jek@ahs.fo

Umsóknarfreistin er 2. januar 2002 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 367, P/F 1. desember 1979, 100 Tórshavn.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Hans Aage Hansen, Varðabú 9, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Høgni Hansen, Livulág 1, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 13. desember 2001

Kristin Balle




Almadan
Lágprísmøbil við góðari dygd, er á goymslu
pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • Tel. 44 75 60 • Fax 44 84 60


**Leiga**

# Høli til leigu á flogvøllinum



Patur av høllini hjá Farmaleiðum er til leigu sum goymsluhotell. Liggur sera væl fyri í samband við flogvøllin.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á tlf. 343060 ella á t-post: hab@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skóttleika.*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2416, Sp/f Andersens Beding, 490 Strendur.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Jón Anders Jógvan Andersen, 490 Strendur (formaður).
Innkomin í nevndina sum formaður: Jóhan Andersen, 480 Skáli.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Anders Asbjørn Andersen, 490 Strendur.
Innkomin sum stjóri: Høgni Andersen, 480 Skáli.

Skráseting Føroya tann 13. desember 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 278, P/F Vatnsoyrar Snikkaravirki, 385 Vatnsoyrar.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Kirstin Poulsen, 385 Vatnsoyrar (næstformaður)
Innkomin í nevndina: Sofus Poulsen, 385 Vatnsoyrar og Heðin Poulsen, 385 Vatnsoyrar.

Skráseting Føroya tann 13. desember 2001

Kristin Balle

veitst tú ikki tað?

# Frá Sildagoymsluni

Vit hava onga sild á goymslu nú til jóla, av tí at fiskaríið ikki hevur verið so gott.
Um sild verur at fáa eftir nýggjár, verður lýst.
Gleðilig jól og gott nýggjár.

**Ólafur Guðmundsson**

# Avgreiðslutíðir á Almannastovuni um jólini

Dagarnar 27. og 28. desember 2001 eru allar deildir hjá Almannastovuni og Hjálpartólamiðstøðini stongdar.

Tó kann bráðfeingishjálp fáast um telefonina báðar dagar millum kl. 10.00 og 12.00.

**Almannastovan og Hjálpartólamiðstøðin**

*Vi söker nya medarbetare till Nordiska rådet*

*Nordiska Rådets sekretariat söker Sekreterare/assistenter*

Mer information om tjänsterna finns på vår hemsida www.norden.org
Där finns också ansökningsblankett som vi vill att du använder.
Alla kontakter ska ske på något skandinaviskt språk.

**Sista ansökningsdag är 11 januari 2002.**

*Nordiskt samarbete sker mellan Danmark, Finland, Island, Norge och Sverige samt de självstyrande områdena Färöarna, Grönland och Åland.*

***Nordiska rådet***
*är samarbetsorgan mellan parlament och regeringar i de nordiska länderna. Rådet består av 87 parlamentariker från de nordiska länderna. Tar politiska initiativ och utövar kontroll över nordiskt samarbete. Nordiska rådet bildades 1952.*

Nordiska
RÅDET
Box 3035
DK-1255 Köpenhamn K

**Kontaktperson:** Rådsdirektör Frida Nokken
Tlf. nr. +45 33 96 04 41

# Pedagogur

## til Dagstovnin á Argjum

Søkt verður eftir 1 pedagogi til vøggustovuna á Dagstovninum á Argjum at byrja 1. februar 2002 ella eftir nærri avtalu.

Dagstovnurin á Argjum er ein sjálvsognarstovnur. Á stovninum ganga 72 børn og samanlagt eru vit 18 starvsfólk.

Á stovninum eru fýra barnagarðsstovur og tvær vøggustovur, har tann eina barnagarðsstovan er ein serstova, har vit samskipa deyv og tunghoyrd og hoyrandi børn.

Á hvørjari stovu ganga 12 børn.

Vøggustovan hevur tætt samstarv við serstovuna, og má viðkomandi hava áhuga í hesum serøki.

Vit ynskja, at tú saman við okkum skapar eitt umhvørvi fyri børnunum og foreldrunum, har tey kunnu trívast og mennast.

Somuleiðis, at tú ert nýhugsandi og hevur ábyrgdarkenslu. Harumframt ynskja vit, at tú ert virkin á stovninum við atliti at víðariútvikling av hesum.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landstýrið.

Ynskir tú at vita meira um starvið, set teg so í samband við Gudrun W. Rasmussen, leiðara, á tlf. 319019.

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum í seinasta lagi 5. januar 2002.

# Hølir til leigu



Ovasta- og miðhæddin í J. C. Svabosgøtu 4 (Málingahandilin) eru til leigu.

Hvør hæddin er uml. 185 m² og kann nýtast til skrivstovu o.l.

Nærri upplýsingar á tlf. 342500, Jóannes.

LITAVAL P/F

Postboks 1019
100 Tórshavn
E-mail: litaval@litaval.fo